# Tómt í landskassanum?

JÓGVAN OLSEN
Tórshavn

Hví skal tað vera ókeypis at brúka vegakervið? Vegakervið hevur kostað samfelagnum nógv – heilt ofta verður tikið til, at tað er ein íløga. Dagliga kostar tað eisini nógv – í form av viðlíkahaldi, ferðsluvanda, fleiri sløgum av dálking og øðrum negativum árinum á trivnaðin. Hví skal alt hetta onki kosta? Hetta er planbúskapur: staturin ger av, at vit øll skulu gjalda fyri bilkoyring – antin vit hava tørv á tí ella ei. Kann tað loysa seg at brúka vegakervið, hava brúkararnir eisini ráð at gjalda fyri tað. Tí er ongin grund at lata vegakervið vera ókeypis at brúka. Hinvegin eru fleiri grundir at leggja brúkaragjald á vegakervið. Tær eru nevndar omanfyri.

Hvussu kann gjald leggjast á vegakervið? Í flestu framkomnu londum er ferðslugjald ein partur av kjakinum um, hvussu ferðslan skal regulerast. Tað er oftast møguleikin at hava teldu við satellittsambandi í hvørjum bili, sum er idealið. Vit hava tó ein annan møguleika: at seta upp einar 30 gjaldstøðir, eins og tær, sum longu finnast í undirsjóvartunlunum, runt um landið. Tøkniliga grundarlagið er longu í lagi, so tað er bert uppsetingin, sum kostar. Hvat kann hon kosta? Tað er sjálvsagt ikki bara sum at siga tað at gissa prísin, men nøkur fólk eiga at vera í landinum her, sum eru før at geva eitt gott boð. 100.000, stykkið, man ikki vera av leið. Um tað so er tað dupulta, kann tað kortini loysa seg. 30 ferðir 100-200 tkr. er 3-6 mió. kr. Fult útbygd kann skipanin hava upp til 90 gjaldstøðir: 18 mió. kr., men ikki er neyðugt at hava so nógvar støðir. Hinvegin, sjálvandi verður gjaldið í tí einstøku gjaldstøðini minni, jú fleiri støðir eru tilsamans.

At byrja við kundi til dømis allar viðlíkahaldsútreiðslurnar av vegakervinum verið lagdar yvir á gjaldsskipanina. Herundir trygging móti omanlopi og leysum seyði. So varð friður av Landsverk, sum hvørt ár ger vart við, at pengarnir eru ov smáir til viðlíkahaldið av verandi vegakervi. Síðan kunnu onnur gjøld so hvørt leggjast afturat – ymisk umhvørvisgjøld, ymisk trygdargjøld og kanska fyri brúksvirðið. Hesi kunnu fara í stóra pott til dømis til at minka um inntøkuskattin ella veitast sum stuðul til barnafamiljur.

3 ella 18 mió. kr. Óansæð er tað bert ein partur av inntøkuni, sum landskassin kann fáa longu fyrsta árið, skipanin koyrir. Hvussu nógv skal samlaða gjaldið vera? Onki órættvíst vildi verið í einum samlaðum gjaldi uppá 500 mió. kr. árliga. Men so stórt skal gjaldið sjálvsagt ikki vera fyrstu árini, meðan samfelagið lagar seg til veruleikan: at ferðslan kostar.

## Skeið fyri sinnisveik á Háskúlanum

TÍÐINDASKRIV
*Stuðulstænastan hjá Nærverkinum og Føroya Fólkaháskúli*

Skeiðið verður 14. – 23. apríl og byrjar mikudagin 14. apríl kl 13.

Lærarar eru Bjørgfinnur Nielsen, Elin Lindenskov, Rói Paturson og aðrir gestalærarar.

Skeiðsgjaldið er 1.800 kr, fyri hvønn. Íroknað gjaldið er undirvísing, tilfar, matur og uppihald.

Á kømrunum eru: dýna, koddi, handklæði og seingjarklæði.

Takið gummistivlar, regnklæði, húgvu, vøttir og eina heita troyggju við til útferðina og onnur uttandura tiltøk og svimjiklæði við til Klaksvíkstúrin. Tey, sum ikki hava hug til at svimja, fara eina ein túr í býin ístaðin. Takið stásklæðini við til gallaveitslina.

Vit fara at stoypa ljós, so um tú eigur jogurtíløt, fruktblikk ella líknandi, so tak tey við at brúka til stoypiformar.

Um tú hevur klæðir, taskur, smúkkur og annað, sum tú ikki brúkar, so tak tað við, so kunna tit býta um við onkran annan.

Hóskvøldið kl 19.30 verður veitsla og tá eru tit vælkomin at bjóða tvey avvarðandi við.

# Søgu- og samfelagsdeildin komin fyri seg aftur

**Virksemi á Søgu- og samfelagsdeildini hevur verið avmarkað seinasta árið, men nú verður aftur farið undir skipaðar útbúgvingar bæði í søgu, stjórnmálaðafrøði og samfelagsvísindum. Deildin væntar, at nógv fólk fara at søkja hesar útbúgvingar. Umsóknarfreistin er 14. juni 2010, men eru pláss, so kann søkjast seinni eisini**.

Seinasta fíggjarár varð játtanin hjá Setrinum lækkað so mikið nógv, at stýrið avgjørdi eingi nýggj lesandi at taka upp heystið 2009, men tey ið vóru byrjað fingu høvi at gera seg liðug við útbúgvingarnar á bachelorstigi. Harumframt bjóðaði deildin út nøkur stakskeið, sum hava verið ógvuliga umhildin.

Eitt tað mest umhildna skeiðið á deildini er *Grundskeið í lóg*. Hvørja ferð skeiðið hevur verið lýst, hava fleiri søkt enn rúm er fyri, og skeiðið verður eisini hildið í heyst. Somuleiðis er deildin farin undir skeið á masterstigi. Í hesum sambandi er vert at vita, at Fróðskaparsetrið hevur gjørt ta avtalu við Københavns Universitet, at skeið tikin á Fróðskaparsetrinum, sum lúka ávísar treytir, kunnu góðskrivast sum partur av útbúgvingini í løgfrøði við Københavns Universitet.

Fleiri enn 100 einstakar umsóknir vóru til lógskeið í vár.

Ein júst liðugur cand. jur. hevur brúkt henda møguleika. Hann tók masterskeiðið *Føroyskan kollektivan arbeiðsrætt* á Fróðskaparsetrinum og fekk tað góðskrivað á cand. jur. við Københavns Universitet. Skeiðini bæði *Føroysk fyrisitingarlóg* og *Mannrættindi og revsirættur í Føroyum*, sum nú verður undirvíst í, eru á sama stigi og fara eisini at kunna verða góðskrivað bæði á Københavns Universitet og eisini í sambandi við komandi masterútbúgvingar í lóg og stjórn á Fróðskaparsetrinum.

At Mentamálaráðnum eydnaðist at sannføra Løgtingið um at hækka játtanina til Setrið fer at geva nógvum føroyingum høvi at fara undir hægri útbúgving í søgu, stjórn og almennum samfelagsvísindum komandi lestrarár, sum byrjar við pisuskeiði beint fyri 1. september.

Av tí at steðgur kom í undirvísingina, hevur deildin nýtt høvi til ikki bert at endurskoða alla undirvísingarskipanina, men eisini tær einstøku útbúgvingarnar og námsskipaninar fyri tær einstøku lærugreinarnar. Hesar verða nú innan leingi at síggja á heimasíðu Setursins. Hetta er alt gjørt at fáa sum mest burtur úr játtanini. Nú verður eisini nógv liðiligari og lættari hjá studentunum at leggja sær útbúgvingina til rættis. Harumframt verður meginparturin av øllum skeiðunum eisini boðin út sum stakskeið, ið fólk kunnu taka sum eftirútbúgving – men tá krevst luttøkugjald.

Nú verða frá byrjan tríggjar ymiskar bachelorútbúgvingar við nakað av felags lestri - og deildin fer at taka studentar inn á hvørjum ári. Tvey tey fyrstu árini verður undirvíst bæði í bundnum skeiðum og valskeiðum. Munur verður ikki gjørdur á fyrsta og øðrum ári, so til ber at hava fak saman við øðrum lesandi bæði á fyrsta og øðrum ári.

Tey ymsu fakini er skipaði í skeið. Øll skeiðini á fyrsta og øðrum árini kunnu takast í teirri raðfylgju, sum tey lesandi sjálvi velja; fakini treytað ikki hvørt annað. Triðja árið fer fram spesialisering í søgu, stjórn ella lisið verður alment innan ymisk samfelagsvísindi. Almenna bachelorútbúgvingin í samfelagsvísindum er tann mest fría av bachelorútbúgvingum okkara.

Fólk við samfelagsvísindaligari útbúgving eru sera nógv eftirspurd í almennari sum privatari fyrisiting. Mong søkja inn á hesar útbúgvingar at menna og útbúgva seg (eisini eftirútbúgva seg) við neyðugum umsitingarligum førleikum. Omaná bachelorútbúgvingarnar verður so seinni skipað fyri masterútbúgvingum í t.d. søgu, stjórn, mentan og lóg.

Hvørja lestrarhálvu fyrstu tvey árini skulu tey lesandi vanliga velja trý fak (10 ECTS hvørt) Útbúgvingarnar byrja frá umleið 1. september og verða tey fyrstu skeiðini hesi:

Grundskeið í lóg (10 ECTS – kann eisini takast sum 15 ECTS)
Mentanarfrøði (10 ECTS)
Føroysk nýtíðarsøga (10 ECTS
Samfelagsvísindalig háttaløg (10 ECTS)
Búskapur og samfelag (10 ECTS)

Lestrarhálva svarar til 30 ECTS og heil bachelorútbúgving telir 180 ECTS. Uppi í hesum er eisini bachelorritgerð.

Søgu- og samfelagsdeildin heldur til í Jónas Broncks Gøtu 25 í rúmligum og góðum hølum.

**Jóan Pauli Joensen rektari og**
**Kári á Rógvi dekanur**

Platforma

kvalitets hvítvørur fyri lágprís

GÓÐ TILBOÐ TIL KØKIN



+ + + + = 16.998,-

**Bosch innbygningsovnur**
Multi funktiónsovnur
Talgilt ur, ljós í ovnrúminum
Orkuflokkur A

**Bosch kókiborð**
4 high speed varmazonir

**Amica eymhetta**
Teleskop-eymhetta
350 m3/h

**Bosch int. uppvaskimaskina**
12 kuvertar, 48db,
Orkuflokkur A

**Elektrolux int. køliskáp**
Orkuflokkur A+
Hædd: 122,5 cm

Í Álakeri · 100 Tórshavn · Tel 315 415

Opið: kl 12.00 – 17.00